# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar

Eg eiti Julian og var føddur 28. oktober 2004. Eg vigaði 3150 gr og var 52 cm langur. Foreldur míni eita Rut S. (Hovi) og Jóhannus E. Láadal (Tórshavn). Vit búgva í Ikast.



22. des. fingu Amy og Svenning Hansen, Fuglafjørður, eina dóttur. Hon var 59 cm. long og vigaði 4700 gr.

27. des. fingu Jóna Klara Borgarlíð og Johnny P. Joensen, Vestmanna, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3500 gr.

30. des. fingu Ester Simonsen og Niels Mortensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 4420 gr.

30. des. fingu Majken Johannesen og Jógvan á Toftini, Toftir, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2700 gr.

31. des. fingu Oddvør Mohr og Bjarni Mohr, Tórshavn, ein son. Hann var 57 cm. langur og vigaði 4400 gr.

1. januar fingu Dagunn H. J. og Eyðfinn Clementsen, Sandur, eina dóttur. Hon var 52 cm.long og vigaði 3750 gr.

2. januar fingu Tóta Klakstein og Óli Hansen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4350 gr.

2. januar fingu Guðrið og Martin Schade, Skælskør, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4180 gr

3. januar fingu Ása Poulsen, Tórshavn og Bjarni Beder, Fuglafjørður, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4345 gr.

4. januar fingu Gerd Leonhardsen og Henning Rindheim, Fuglafjørður, eina dóttur. Honv ar 56 cm. long og vigaði 3700 gr.

6. januar fingu Guðrun Jacobsen og Jákup William Sivertsen, Argir, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 4220 gr.

6. januar fingu Rakul Hansen og Búi Uni Jensen, Saltangará, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 3950 gr.

## Brúdleyp

Í dag, 8. januar giftast Sóley Einarsson, Lamba og Jóhan á Lava Sundskarð, Klaksvík. Opið hús verður kl. 17.00 hjá Sóley og Jóhan, Byrgisheyggur 15 Lamba. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## 90 ár

Mánadagin 10. januar verður Jógvan Jacobsen, Vestmanna 90 ár. Dagurin verður hildin saman við familjuni.

## Prógv

Nikkels Djurhuus, Tórshavn hevur 5. januar 2005 lokið prógv sum cand.merc.fir. á Handilsháskúlanum á Fredriksberg.

# Jógvan á Fjørðinum 90 ár



Mánadagin 10. januar verður svágur 90 ár.

Fyri einum lítlum mánaði síðani vóru vit í Vestmanna í diamantbrúdleypi hjá tykkum. Har høvdu vit eina hugnaliga løtu, sum vit takka tykkum so hjartaliga fyri.

Góði Jógvan, nógv kundi verið at trivi í og sagt um teg. Vit sigldu saman við Stelluni – tað mundi vera tað mesta av trimum árum. Vit fiskaðu fyri tað mesta eystanfyri. Vit kláraðu stak væl upp báðir, aldrin eitt øvugt orð okkara millum.

Sum oftast bunkraðu vit einaferð á hvørjum túri, og eg minnist, at vit gleddu okkum at fáa post.

Tað var oftani pakki frá Jonnu við heimabakaðum køkum, tá fekk eg altíð mín part burturav, gávumildur var tú altíð.

Fittur vart tú í hondum Jógvan, eg minnist at tú plagdi at gera grindaknívar og skutlar, tað var snøgt gjørt.

Ja, vit hava havt manga góða løtu saman, sum eg minnist afturá við takksemi.

Vit hava altíð verið væl móttikin, tá vit hava vitjað tykkum, tit vita ikki, hvussu blíð tit skulu vera, bæði tú og Jonna.

Til seinast vilja vit bæði ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, og vóna at tit bæði hava tað gott framyvir.

**H.**

# Egil Restorff 85 ár



Mánadagin 10. januar fyllir Egil Restorff í Havn 85 ár.

Egil er yngsti sonur Linu, f. Heinesen, ættað úr Bø, og Frants Restorff, sum stovnaði Restorffs Bakarí í 1902.

Egil var einans 13 ára gamal, tá pápin doyði í 1933.

Eins og pápin hevði Egil eisini hug at royna seg í bakarayrkinum, og í 1936 fór hann í bakaralæru hjá Napoleon Olsen, Bona, sum tá var bakarameistari hjá Restorffs Bakarí.

Eftir at hava lært í tvey ár fór Egil í 1938 til Danmarkar, har hann halt áfram við bakaralæruni í Danmark hjá systkinabarninum, Herluf Heinesen, sum var ættaður úr Bø og hevði lært til bakara hjá Restorffs Bakarí.

Áðrenn Egil var liðugur við bakaralæruna brast annar heimsbardagi á, og hann slapp tí ikki heim aftur.

Frá 1942-45 hevði Egil egið bakarí í Willemoesgade í Keypmannahavn.

Í 1945 seldi hann bakaríið og flutti heim aftur til Føroya og gjørdist stjóri í partafelagnum Frants Restorff. Teir sum arbeiddu á bakarínum tá vóru: Napoleon Olsen, Eigil Joensen, Jacob Weihe og Jarmund Ludvig.

Í 1950 giftist Egil við Michaelu, sum var ættað av Tvøroyri. Tey fingu sonin Heina, sum í dag er stjóri í fyritøkuni.

Michaela andaðist í 14. mai 2000.

Tveir av bakarunum, Napoleon Olsen (Bona) og Eigil Joensen, fingu báðir kongaligt heiðursbræv fyri drúgva tænastu meðan Egil var stjóri.

Egil eigur trý abbabørn, Heidi, 19, Barbaru, 16, og Egil, 12 ár.

Føðingardagin verður móttøka í heiminum í Kongagøtu 5 millum kl. 12 – 18, har høvi verður at heilsa upp á Egil.

## Andlát

20.12
Mignon Sjóstein, Klaksvík, 82 ár.
Klæmint Olsen, handilsskúlalærari, Tórshavn, 52 ár.

21.12
Elin Askham, Tórshavn, 70 ár
Egil Lindahl, Klaksvík, 83 ár

22.12
Jens Klement Jensen, Skálavík, 82 ár

25.12
Gunvør Joensen, Nólsoy, 70 ár
Ester Jacobsen, Hvalvík, 83 ár

26.12
Erna Kjærbo, Sumba, 81 ár
Svend Lausen, Tvøroyri, bús. í Íshøj, 61 ár

27.12
Hákun Magnussen, Tórshavn, 77 ár
Turid Sørensen, fødd Midjord, Tórshavn, 45 ár
Martin Poulsen, Froðba, 86 ár

28.12
Jørgen Emil Ellingsgaard, Eiði, nevndur Jørgen í Garði, 76 ár

29.12
Einar Olgeirsson, Vestmanna, ættaður úr Íslandi, 62 ár
Ragnhild Bisp, fødd Holm úr Hvalba, bús. á Argjum, 86 ár.

30.12
Betta Holm í Hvalba, 81 ár.
Valdemar Dalsgaard í Hoyvík, 75 ár.
Hervør í Rættará úr Havn, bús. á Fanø, 63 ár.
Frímann á Brúnni, prestur, 74 ár

01.01
Jákup Øster Joensen, 17 ár.
Sólja Ingunnardóttir Mortensen, 14 ár.

02.01
Bodil Simonsen, Klaksvík, 79 ár.
Gustav Bech Olsen á Tvøroyri, 58 ár.

03.01
Poulina Knudsen, Glyvrar, 80 ár
Rói Egholm Árting, Tórshavn, 37 ár